# Avgustur *Physeter macrocephalus*

Kigutilissuit | Búrhvalur | Spermasetthval | Kaskelohtta | Kaskelothval | Sperm whale



Avgustur © Shane Gross

Avgusturin er tann størsti tannhvalurin og størsta ránsdjórið, sum finst. Hann hevur ein langan, mjáan undirkjaft við umleið 25 tonnum hvørjumegin, men ongar tenn í yvirkjaftinum. Avgusturin heldur til í heimshøvunum frá tropunum og til ískantin. Teir eru kendir fyri, hvussu leingi og hvussu djúpt, teir kava. Teir fara niður á 2000 metra dýpi og kunnu vera undir í tveir tímar. Teir eta fyri tað mesta djúphavshøgguslokk, og teirra stóra, fýrakantaða høvd fær ofta arr av at berjast við høgguslokkin. Avgusturin hevur tann størsta heilan av øllum djórum; hann vigar upp móti 9 kg!

**Longd á vaksnum** 16 metrar
**Vekt á vaksnum** 45,000 kg
**Hámarksaldur** 70 ár
**Tað etur** tíggjuarmaður høgguslokkur, áttaarmaður høgguslokkur, stórur fiskur

**Bólkastødd** 1-10
**Ránsdjór** bóghvítuhvalir
**IUCN-støða** viðbrekin (2022)
**Ovurnøgd í Norðureysturatlantshavinum** 30,000
**Ikki veiddur í Norðuratlantshavi**

**Hóttanir:**

Veðurlagsbroytingar | Skipssamanstoytur | Fløkja | Ljóðórógv | Dálking

FOLD

# Avgustur *Physeter macrocephalus*

Kigutilissuit | Búrhvalur | Spermasetthval | Kaskelohtta | Kaskelothval | Sperm whale

Á kaldari havleiðum, sum t.d. í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum, síggja vit ofta einsamallar, vaksnar avgustar. Hann-hvalurin er nógv størri (16 metrar) enn hon-hvalurin (11 metrar), og teir hava eisini eitt tjykkri lag av spiki fyri at halda seg heitar. Hon-hvalirnir halda seg vanliga longri suðuri, á heitari havleiðum, har tær liva í sosialum bólkum saman við teirra ungum og teimum yngru avgustunum. Meðan teir vaksnu hon-hvalirnir kava langt niður eftir føði, verður ein vaksin hvalur eftir saman við ungunum at vera "dadda" og enntá geva øðrum ungum at súgva. Hendinga ferðir og bara ávísar tíðir av árinum og í ávísum økjum, koma avgustar saman í hundraðtali í sonevndum "superpods" av sosialum orsøkum, sum t.d. fyri at gníggja sær móti hvørjum øðrum fyri at fáa hvøljuna av.



Bólkur av avgustum © Dmitry Kokh



Arr á kúluni á avgusti © Dmitry Kokh

Fyrr vórðu avgustar veiddir fyri at vinna vaks úr lýsinum úr kúluni, sum varð nýtt til ljós og smyrjing. Í dag virðismeta fólk ambra, eitt sjáldsamt evni, sum verður framleitt í sodningarkervinum, har tað leggur seg um lutir, sum hvalurin ikki kann sodna, sum t.d. nevið á høgguslokkum. Ambra hevur ein serstakan lukt og verður nýtt í luktilsi fyri at fáa angan at halda longur. Tað er dýrt, tí tað er trupult at fáa fatur á – ofta er tað skolað í land ella liggur og flýtur í sjónum. Hóast aðrar nýmótans møguleikar er ambra framvegis sera nógv umtókt í luktilsisídnaðinum, og eitt petti kann geva í túsundatali av dollarum.

**Gransking:** Har barduhvalur hevur tvey blástur á kúluni, hevur tannhvalur bara eitt. Hesi eru vanliga í miðjuni av kúluni, men blástrið hjá avgusti er á vinstru síðu. Hví man tað vera so..?